Skúlastýrisfundur 8. Apríl 2021

Møtt vóru : Durita, Jónleyg, Birgir, Rakul, Hjørdis og John Henrik

Skrá:

1. Frá seinasta lærarafundi
2. Setan av nýggjum kvøldskúlaleiðara
3. Ein túrur í framhaldsdeildina
4. Fyrilestur við Eyðbritt Hjelm um orðblindni
5. Ymiskt

Ad. 1

John Henrik fortaldi um afturmeldingarnar frá lærarunum, um broytingar í komandi skúlaárið. Innskúlingin ynskti tímatalvuna aftur, sum var galdandi í skúlaárinum 2018-2019

| 1. flokkur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Onsdag | Tórsdag | Fríggjadag |
| 1. tími kl. 08.00 | Lesing/RP/JT | Rokning/JT/2 | Verkstaður RP /JT/2 | Rokning/JT/RP | Rokning/JT/RP |
| 2. tími kl. 08.55 | Skriving/RP/CG | Lesing/RP/2 | Verkstaður RP/JT/2 | Lesing/RP/CG | Lesing/RP/CG |
| 3. tími kl. 10.00 | Rørsla/RP/CG | Skriving/RP/2 | Verkstaður RP/JT/2 | Rørsla/RP/FP | Skriving/RP/CG |
| 4. tími kl. 10.45 | Sjónleikur/RP/CG | Svimjing/CG/JT/2 | List/tónleikur/ CG/FP | Heimst. / FP/CG | Matgerð/floksins tími |
| 5. tími kl. 11.50 | Rokning/JT/RP | Svimjing/CG/JT/2 | List/tónleikur/ CG/FP | | Matgerð/floksins tími |
| 6. tími kl. 12.45 | | | | | |
| 7. tími kl. 13.30 | | | | | |

| 2. flokkur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Onsdag | Tórsdag | Fríggjadag |
| 1. tími kl. 08.00 | Lesing /CG | Lesing /CG | Verkstaður/CG | Lesing /CG | Lesing /CG |
| 2. tími kl. 08.55 | Rokning/JT | Rokning/JT | Verkstaður/CG | Rokning/JT | Kristni/JT |
| 3. tími kl. 10.00 | Rørsla/JT | Rørsla/JT | Verkstaður/CG | Rørsla/CG | Rokning/JT |
| 4. tími kl. 10.45 | Sjónleikur/JT | Heimst./FP | Svimjing/JT/CG/ET | Kristni | Matgerð/floksins tími |
| 5. tími kl. 11.50 | | Heimst./FP | Svimjing/JT/CG/ET | Sjónleikur | Matgerð/floksins tími |
| 6. tími kl. 12.45 | Kristni/JT | | | | |
| 7. tími kl. 13.30 | | | | | |

| **3. flokkur** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Onsdag | Tórsdag | Fríggjadag |
| 1. tími kl. 08.00 | Lesing/AH | Lesing/AH | Verkstaður/ET/FP | Lesing/AH | Kristni/FP |
| 2. tími kl. 08.55 | Skriving/AH | Skriving/AH | Verkstaður/ET/FP | Rokning/ET | Rokning/ET |
| 3. tími kl. 10.00 | Rørsla/AH | Rørsla/AH | Verkstaður/ET/FP | Rørsla/AH | Lesing/AH |
| 4. tími kl. 10.45 | Sjónleikur/FP | Rokning/ET | Svimjing/JT/CG/ET | Danskt / AH | Matgerð/floksins tími |
| 5. tími kl. 11.50 | Kristni/FP | list/tónl./AH | Svimjing/JT/CG/ET | Danskt / AH | Matgerð/floksins tími |
| 6. tími kl. 12.45 | Heimst./ET | list/tónl./AH | | Heimst./ET | |
| 7. tími kl. 13.30 | | | | | |

Afturat tí ynksti innskúlingin fríkorter kl. 9-9.20 og kl. 11.15-11.30. Vanliga er at eta í 3. Tíma, kl. 10.05, til uml. Kl 10.25. Oftast verður farið út at fáa okkum luft aftaná matarsteðgin.

Tað hevði verið gott, um tað var skipað, nær næmingar í ymsu deildunum, kunnu vera úti í tímunum, soleiðis at bland ikki kemur í av óvart, um næmingarnir sleppa út.

Miðdeildin

- Møguleika fyri minni bólkum
- Hølisviðurskifti – ynski um at hava fleiri smærri hølir til bólkararbeiði
- Ynski um at FØ, DA, RO liggja fyrst á degnum. Handverk & list síðst á degnum
- Broyta ítróttin- Bólkarnir eru ov stórir – kanska bólka eftir førleika
- Býta miðdeild upp i 4 flokkar í ávísum fakum, kanska eftir førleikum
- Brúka Auluna til hugna og kunnu arbeiða í bólkum

Háðdeild

- Arbeiða meira í verkæltanum
- Leggja FØ, DA, RO samstundis
- Broyta td. Greina, tulka – málløru – bókmentir
- Fara meira út í náttúruna, vitja virkir vm.
- Hava ein øðrvísi dag, har tú gert tað tú ynskir (lærarar gera ætlan)
- Betra um umstøðurnar, so næmingarnar kunnu arbeiða í bólkum kring um í skúlanum

10. flokkur

- Vágs Skúli og Tvøroyrar skúli hava avtalað at samstarva um 10. flokk og at samstarva við eftirskúlan á Tvøroyri.
- Gera túrar saman
- FØ, RO er fast á tímatalvuni
- Okkara breyt (næmingahugskot)
- Bakkafrost at arbeiða
- Gestalærarar
- Flokslærarar fáa tímar til toymisarbeiði við lærarar á Tvøroyri.

Ad. 2

Skúlastjórin hevur, eftir áheitan frá kommununi, gjørt eitt tilmælið um hvør skal taka við eftir Sølva, nú hann gevst. Skúlastjórin legði fram tilmælið fyri skúlastýrið og skúlastýrið tók einmælt undir við tilmælinum.

Ad. 3

Skúlastýrið var ein túr runt í framhaldsdeildini, har skúlastjórin vísti fram hølisumstøðurnar og greiddi frá framtíðar avbjóðingar við hølunum í framhaldsdeildini. Komandi skúlaár verður 8. flokkur 25 – 26 næmingar og hesir fáa tað sera trongligt í verandi skúlastovum. Eitt hugskot er at flyta bókasavnið niður í Auluna. Hetta hevði leysgivið eitt stórt flokshøli til ein framtíðar flokk við 25-26 næmingum. Tað viðførir so at Aulan ikki kann brúkast til tað virksemi, sum vit brúka hana í dag. Men framtíðar ætlanin við gl. svimjihyli hevði loyst trupuleika okkara við einum felagshøli har allur skúlin kann samlast.

Ad. 4

Skúlastýrið umrøddi fyrilestur, sum Eyðbritt Hjelm hevði fyri børnunum frá 6. – 10. flokki. Vit hava fingið nógvar jaligar afturmeldingar og fleiri áheitanir frá foreldrum um at fáa í lag ein fyrilestur afturat við Eyðbritt fyri foreldrum. Skúlastýrið avgjørdi at Durita skuldi tosað við Eyðbritt, og kanna um tað ber til at fáa í fyrilestur í lag í sept.

Ad. 5

Skúlastjórin legði fram úrslitini fyri landsroyndina í heyst.

D. Poulsen

Durita Poulsen

R Brattaberg

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Levi Mørk (bert lisið)

Jónleyg Eyðunsson

Jónleyg Eyðunsson

Hjørdis R. Simonsen

Hjørdis Ryggshamar